

*Johnhard Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingur*

# Umboðsmaður skal basa illgitingum

**Tørvur er á einum umboðsmansstovni í lítla føroyska samfelagnum, tí neyðugt er at mana illgitingar í jørðina, segði Johnhard Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingur í Almannamálráðnum og Heilsumálaráðmum, á ráðstevnu um løgtingsins umboðsmann fríggjadagin. Rot kann kom í samfelagsskipanina, og samfelagið skal verja seg mótvegis tílíkum roti, helt hann**

Uni Arge

Tá løgtingsins umboðsmaður fór til verka í 2001, varð heilt bókstaviliga byrjað á berum. Tvey starvsfólk, Johnhard Klettheyggj og Laila Egholm, fóru sum tey fyrstu til verka í skrivstovuhølunum hjá Realinum í Niels Finsensgøtu í Havn í apríl hetta árið. Har vóru hvørki telefonir ella teldur, og tað kendist løgið, tí vanliga hava stovnar tílíkar hentleikar tøkar. Men stovnurin var nýggjur og skuldi byggjast upp frá grundini, og hetta var so uppgávan, ið tey bæði høvdu fingið saman við fyrsta umboðsmanninum, Joen H. Andreasen, ið byrjaði í starvinum 1. mai í 2001.

Johnhard Klettheyggj var ein av teimum, sum helt fyrilestur í Skálanum í Norðurlandahúsinum fríggjadagin í sambandi við, at 10 ár vóru liðin, síðan umboðsmansstovnurin fór undir sítt virksemi. Hann mintist, at fleiri spennandi mál løgu og bíðaði eftir løgtingsins umboðsmanni, meðan skrivstovuhølini vórðu riggað til. Tað mest umstrídda málið snúði seg um setanina av nýggjum landsverkfrøðingi. Kundi ein almennur myndugleiki einans skriva í eitt svar til ein fyrrverandi stjóra, ið søkti og ikki fekk starvið, at annar umsøkjari var settur?

Tað helt umboðsmaðurin ikki. Gamla siðvenjan var at svara umsøkjarum stutt við at takka teimum fyri áhugan og síðan vísa á, at starvið var latið øðrum. Henda siðvenja er nógv broytt, síðan umboðsmaðurin í málinum um landsverkfrøðingin vísti á, at ein maður, sum hevði starvast í 23 ár á einum stovni, harav 10 ár sum stjóri, hevði krav upp á eina nágreiniliga grundgeving um, hví hann ikki kundi halda fram sum stjóri. Við m.a. hesum døminum vísti Johnhard Klettheyggj á, at umboðsmaðurin veruliga hevur gjørt mun, síðan hann fór til verka.

### Mentor í skipanini

Johnhard Klettheyggj nevndi, at hann fleiri ferðir hevði hoyrt fólk siga, at umboðsmaðurin hevur onki veruligt vald, tá á stendur. Hann kemur við eini átalu, og so hendir ikki meira. Tí skuldi umboðsmaðurin heldur havt støðu sum ein fyrisitingardómstólur, so hann kundi broytt skeivar avgerðir í fyrsitingini, hava summi sagt. Hesum tók Johnhard Klettheyggj ikki undir við. Skipanin við umboðsmanninum leggur upp til, at hann skal koma við tilmælum og áheitanum, ið skulu fáa umsitingina at viðgera mál umaftur ella umhugsa mannagongdir av nýggjum. Johnhard Klettheyggj segði:

"Á hendan hátt er lagt upp til, at umboðsmaðurin verður eitt slag av mentori hjá fyrisitingini, og at fyrisitingin fær sjálvjustits, so hon sjálv kann rætta síni mistøk. Skal skipanin virka, krevur hetta, at fyrisitingin er búgvin at viðurkenna møguligar feilir og rætta teir. Skipanin krevur eisini, at politiska skipanin er búgvin. Tá umboðsmaðurin rakar við álvarsom mistøk, skal hann boða formansskapinum í løgtinginum, løgmanni og avvarðandi landsstýrismanni frá hesum. Tankin er, at landsstýrismaðurin skal halda í oyruni á fyrisitingini, løgmaður í oyruni á landsstýrismanninum og tingið í oyruni á løgmanni."

Hetta er ein góð skipan, helt Johnhard Klettheyggj og átalaði, at tingformaðurin onkuntíð hevur boðað frá í fjølmiðlunum, at tingið fór onki at gera við niðurstøðu, ið umboðsmaðurin var komin við. Hetta hendi eitt nú, tá grannskoðarafrágreiðingin varð almannakunngjørd í november 2010. Tílík útsøgn var at undirgrava myndugleikan hjá umboðsmanninum, helt Johnhard Klettheyggj, sum tó mundi fegnast um útsagnirnar hjá Hergeiri Nielsen, løgtingsformanni, fríggjadagin, tá hann stuðlaði umboðsmanninum dyggiliga og fanst hvassliga at politisku skipanini fyri ikki at hava tikið avleiðingar av grannskoðaramálinum.

### Fjas og tíðarspilla

Johnhard Klettheyggj upplýsti, at tey málini, sum fylla mest hjá umboðsmanninum, eru innlitsmál og starvsfólkamál. At innlitsmál hava fylt nógv, er ikki so løgið, helt hann. Innlitslógin er frá 1994, so hon er ikki gomul, og fyrisitingarnar hava skulað havt stundir at vant seg við hana. Jonhard Klettheyggj hevur í mong ár undirvíst í almennum innliti og hevur mangan hoyrt fólk siga, at reglurnar um innlit eru tað reina fjas og tíðarspilla. Hetta er sera vandamikil hugburður í einum demokratiskum samfelag, sum tó er um at hvørva, nevndi hann, ikki minst orsakað av umboðsmanninum.

Hann bað fólk hava í huga, at kritikkur frá umboðsmanninum í einum máli ikki altíð er keðiligur, og at kritikkurin ongantíð er persónligur. Er orsøkin til trupulleikarnar, sum umboðsmaðurin vísir á, vantandi arbeiðsorka, so kunnu atfinningarnar brúkast til at fáa hægri játtan. Í øðrum førum kunnu tær verða brúktar konstruktivt at vita, hvørjir batar kunnu fremjast, eins og eitt nú Almannastovan hevur dugað væl. At umboðsmaðurin hevur týdning, ivaðist hann ikki í.

"Tørvur er á einum umboðsmanni, serliga í okkara lítla samfelag. Hesa fatan byggi eg á, at viðurskiftini eru smá og relatiónirnar tættar, tað veri seg vegna familju ella kennskap. Tí er bæði ein ávísur vandi fyri, at rot kann koma í skipanirnar, og at gróðrarbotnur er fyri illgitingum um hetta sama. Umboðsmaðurin er ein fínur máti bæði at fáa staðfest, um okkurt er galið, ella at fáa illgitingar manaðar í jørðina. Spurningurin um, hvussu skipanin við umboðsmanninum skal gagna samfelagnum, liggur ikki bara í hondunum á umboðsmanninum, men minst líka nógv í hondunum á samfelagnum," segði Johnhard Klettheyggj.